# ørt eina bjarging



**TELEFONSTORMUR**

***– Telefonin hevur kimað líka síðani dystin. Tað var líka við, at telefonin brann saman ta einu løtuna, sigur Gunnar Nielsen***

*Mynd: Polfoto*

við meg, og so fór eg inn á vøllin, sigur Gunnar um ráðini, hann fekk frá Roberto Mancini.

– Teir vóru sjálvandi glaðir mina vegna og fleiri komu yvir at ynskja mær til lukku. Bæði spælarar, liðleiðarar og venjarar, tað var stuttligt, sigur Gunnar um stemningin eftir dystin í skiftirúminum.

– Tað var sjálvandi annarleiðis hesa ferð. Tá eg líka hevði fingið eina løtu fyri meg sjálvan, so dugdi eg væl at síggja, at hetta var stórt. At fáa debut á einum fullsettum Emirates Stadium ímóti Arsenal, ið einum týdningarmiklum dysti er stórt, sigur Gunnar um kensluna at seta seg í leikarabussin eftir dystin.

## Telefon gløddi

Tað er nógv, ið hava ynskt Gunnari til lukku við fyrsta dystinum.

– Telefonin hevur kimað líka síðani dystin. Tað var líka við, at telefonin brann saman ta einu løtuna. Fólk hava ringt og skrivað sms og ynskt mær til lukku, so tað er bara skeg, sigur Gunnar.

Eftir dystin fekk Gunnar eitt avrit av dystinum heim við. Men hvussu kennist tað at síggja seg sjálvan spæla í Premier League?

– Tað var ein undarligt kensla. Tað var løgið, men av tí at eg visti, at eg hevði klárað meg væl, so var tað ikki so ringt. Tað er ikki rættiliga gingið upp fyri mær enn, men tað var kul at síggja meg sjálvan í sjónvarpinum. Men hevði eg vitað, at eg kom inn í dag, so hevði eg rakað mær áðrenn dystin, sigur Gunnar við einum brosi.

## Friedel ynskti til lukku

Fyrsti málmaðurin hjá Manchester City, írin Shay Given, var smáskaddur í vikuni upp undir dystin og fekk ikki vant við fullari ferð.

– Hóast Shay Given hevur verið skaddur í vikuni upp til dystin, var tað alltíðina ætlað, at hann skuldi spæla leygardagin. Hann meiddi sær økslina, tá Paul Scholes skoraði ímóti okkum seinasta vikuskifti, og hevur tí ikki vant eina fulla venjing síðani tá.

Og Shay Given stóð í málinum, men hann meiddi seg álvarsliga í økslina í einari bjarging 20 minuttir fyri leiklok.

Sum støðan er í løtuni, skal Gunnar verja málið hjá Manchester City, tá Aston Villa komandi vikuskiftið kemur á vitjan. Í málinum hjá Aston Villa stendur Brad Friedel, ið var málmaður saman við Gunnari í tíðini í Blackburn.

– Um tað verður støðan, so verður tað ordiliga skeg. Brad Friedel hevur lært meg nógv, og hann hevur longu skrivað til mín og ynskt mær til lukku. Tað hevði verið spennandi, men undir dystinum hevði eg nokk ikki hugsað so nógv um tað. Heldur áðrenn og aftaná, sigur Gunnar um møguleikan at hann skal spæla ímóti Brad Friedel.

– Nú hava vit frí í tveir dagar, og so venja vit annars sum vanligt upp til dystin um vikuskiftið, sigur Gunnar at enda um skránna komandu vikuna.

Eftir standa vit so við einum nýggjum kapituli í føroyskari fótbóltssøgu. Vit hava endiliga fingið ein føroyskan spælara í Premier League, og tað er nú prógvað, at tað ber til at koma úr Føroyum og røkka langt – ótrúliga langt!

trondur@sosialurin.fo

# Koyrdu í toki

Gunnar Nielsen sigur soleiðis um fyrireikingarnar til dystin á Emirates leygarkvøldið:

– Vit vandu fríggjadag á døgurða og fóru so við toki til London, har vit fóru beint á gistingarhús. Vit fingu ein bita og fóru so í song. Morgunin eftir svóvu vit leingi. Tað var upp til tann einastaka, um hann vildi hava morgunmat, og so fóru vit ein gongutúr eftir døgurðatíð. Klokkan tvey fingu vit so »pre match meal« og fóru síðani á taktikfund, áðrenn leiðin gekk á stadium.